# TB og SÍ spælt seg í steypafinaluna




*Við at vinna kappingina í Klaksvík um vikuskiftið tryggjaðu menninir hjá SÍ sær aftur í ár pláss í steypafinaluni í flogbólti.*

**Um vikuskiftið var árliga Com-Data kappingin hjá Mjølnir leikt, og tá gjørdist greitt, at kvinnurnar hjá TB og menninir hjá SÍ aftur í ár hava spælt seg í steypafinaluna**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nú er greitt, hvørji lið skulu hittast í steypafinalunum í flogbólti, sum verða leiktar í ítróttarhøllini á Hálsi leygardagin 12. februar. Fyrr í heyst gjørdist greitt, at bæði kvinnurnar og menninir hjá Mjølnir vóru annar parturin í finalunum báðum. Hetta var staðfest, tá ið hesi bæði lið vunnu árligu FK-kappingina, sum Fleyr skipar fyri í Havn.

### TB skal verja borg

Um vikuskiftið var so kappast í Klaksvík, og sunnudagin vóru finalurnar á skránni. Í meistaradeildini hjá kvinnum spældu vertirnir úr Mjølnir seg í finaluna, har mótstøðuliðið var TB. Hetta eru eisini tey bæði fremstu liðini í landskappingini, og av tí at Mjølnir longu hevði tryggjað sær annan sessin í steypafinaluni, var longu undan finaluni í Klaksvík sunnudagin greitt, at TB átti hin sessin.

Tað vóru gestirnir av Tvøroyri, sum fóru avstað við sigrinum í Klaksvík sunnudagin, tá ið tær vunnu finaluna 3-1 í settum. Settúrslitini vóru 11-25, 25-20, 25-23 og 25-9 til TB, sum sostatt kanska kann sigast at hava sálarligu yvirvágina undan steypafinaluni í næsta mánað.

TB var eisini annað liðið í finaluni í fjør, tá ið mótstøðuliðið var Dráttur úr Sandavági. Tá vunnu tvøråkvinnur steypið, og í ár skulu tær so verja borg móti føroyameistarunum úr Mjølnir.

### Nýggjur vinnari hjá monnunum

Undan steypafinaluni hjá monnum er í hvussu so er greitt, at vit í ár fáa ein nýggjan steypavinnara. Í fjør vóru tað fuglfirðingar, sum fóru avstað við steypinum, men teir verða ikki annar parturin í finaluni í ár.

Tað var tó annars nær við, at ÍF, sum ikki tykist hava somu styrki í ár sum í fjør, eitt sindur óvæntað spældi seg í finaluna í ár, tí teir megnaðu at spæla seg í finaluna í Klaksvík sunnudagin, har teir tó noyddust at lúta fyri sørvingum, sum vunnu 3-0. Settúrslitini vóru 25-12, 25-22 og 25-15.

SÍ var eisini í steypafinaluni í fjør, men tá taptu teir ein spennandi dyst móti fuglfirðingum í einari fullsettari høll á Hálsi.

Í ár verður mótstøðuliðið hjá SÍ í finaluni so Mjølnir, men tað ger neyvan uppgávuna lættari, tí Mjølnir eru verjandi føroyameistarar og eisini eitt av oddaliðunum í landskappingini saman við sørvingum.




*Kvinnurnar hjá TB vunnu Com-Data kappingina í Klaksvík um vikuskiftið og tryggjaðu sær harvið sess í steypafinaluni 12. februar.*

## Benny hevur ikki ábyrgdina

**Andrew av Fløtum og liðfelagarnir í Fremad Amager fara í dag undir aftur venjingarnar, men høvuðsvenjarin er ikki førur fyri at standa fyri, tí hann liggur á sjúkrahúsi í Onglandi**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Í dag fara Andrew av Fløtum og liðfelagarnir hjá honum í Fremad Amager undir fyrireikingarnar til fótbóltsvárið og summarið. Talan er um spennandi tíðarskeið, sum teir í Sundby fara at fyrireika seg til. Fyrsta royndin verður sunnudagin 6. mars í steypakappingini. Tá skal Fremad Amager spæla móti FCK. Hóast Fremad Amager eigur rættin til heimavøll, so verður uppgerðin í Parkini, sum er heimavøllurin hjá FCK. Sundby vøllurin verður ikki roknaður at vera tøkur 6. mars, og har verður heldur ikki roknað við, at tað fer at verða pláss fyri øllum áskoðarunum.

Umframt spennandi avbjóðingina í fjórðingsfinaluni í steypakappingini, so er Fremad Amager hampuliga væl fyri í landskappingini í næstbestu deildini. Teir eru á sjeynda plássinum, og í fyrsta umfarinum eftir vetrarsteðgin skulu teir sunnudagin 20. mars spæla á heimavølli móti AC Horsens, sum í løtuni er oddalið.

**Benny hjartatrupulleikar**

Venjari hjá Andrew av Fløtum, sum nú er einsamallur føroyingur eftir í Fremad Amager, er Benny Johansen. Tað hevur hann verið síðani síðsta summar. Men Benny Johansen er ikki førur fyri at hava ábyrgdina av venjingini í dag, og hann verður neyvan at síggja í Sundby næstu dagarnar. Nær hann aftur verður førur fyri at hava ábyrgdina av venjingunum er ivasamt. Í staðin verður tað hjálparvenjarin, Peter F. Hansen, sum fer at standa fyri venjingini.

Orsøkin, til at Benny Johansen, sum annars verður roknaður at vera sera samvitskufullur venjari, ikki er førur fyri at røkja arbeiðið hjá sær, er, at hann í síðstu viku varð lagdur undir skurð. DBU skipaði fyri venjaraskeiði í Onglandi, og tá var tað, at Benny Johansen gjørdist illa til passar og varð innlagdur. Tað vísti seg, at hjartað ikki riggaði, sum tað skuldi. Læknarnir bóru skjótt at og syrgdu við bypass viðgerð fyri, at hjartað nú aftur riggar, sum tað eigur at gera. Í donskum bløðum verður upplýst, at Fremad Amager venjarin verður fluttur til Danmarkar í hesi vikuni, men Andrew av Fløtum og hinir í felagnum fara neyvan at hitta hann í Sundby nú beinanvegin.